Útlendsku fyritøkurnar standa fyri arbeiðinum

meðan tær føroysku ikki sleppa upp í part, ella bert sum ífylla

Sum vit søgdu frá herfyri, virka og hava virkað hesa seinastu tiðina ikki færri enn 47 útlendskar byggifyritøkur — bert í Havn.

Nakrar av hesum fyritøkum hava verið boðsendar higar til eitthvørt »specialarbeiði« meðan aðrar hava verið meira at kalla einaráðandi á ávisum økjum og fyri ávisar persónar og fyritøkur.

Í mongum førum er als ikki komið upp á tal at lata føroyskar fyritøkur vera við at bjóða upp á arbeiðir, og í mongum førum er útlendsk fyritøka beinleiðis biðin um at taka sær av høvuðsarbeiðstøkuni. Í nøkrum av seinast nevndu førum eru føroyskar fyritøkur sloppnar við sum ífylla til smærri arbeiðir fyri hina útlendsku.

Teir arbeiðsánarar, sum sýnast at ganga á odda at boðsenda útlendskum fyritøkum eru Tórshavnar Kommuna, SEV og Fiskasølan.

Útlendingar gera størstu arbeiðini

Hyggja vit fyrst eftir teimum stóru arbeiðunum, sum Tórshavnar Kommuna hevur staðið fyri, kunna millum onnur nevnast Havnaskrivstovan. E. Pihl & Søn ger arbeiðið saman við danska felagnum Kaj Larsen. Á Sandvikahjalla byggir E. Pihl & Søn, ella rættari sagt dótturfelag teirra Istak, brennistøðina sum



Orð: *Tórfinn*
Mynd: *Kalmar*

høvuðsarbeiðstakari. Sama er við reinsiverkinum í Villingardali. Arbeiðið við byrgingina hevði Højgaard & Schultz. Her vóru onkrar føroyskar fyritøkur uppií.

Havnabyggingina ger E. Pihl & Søn. Fyrst upp á